# NÁMSSKIPAN

FYRI ÚTBÚGVING TIL

# BILSMIÐ

YRKIS depilin

Útgávudagur 1. august 2025

*(fyri lærlingar, sum byrja skúlagongdina eftir 1. august 2025)*

1 Um útbúgvingina ........ 3
2 Førleika- og lærumál ........ 3
3 Útbúgvingartíð, bygnaður og innihald ........ 7
4 Eftirmeting av skúlaskeiðum ........ 11
5 Sveinaroynd ........ 12
6 Endurpróvtøkur og sjúkrapróvtøka ........ 14
7 Kærumøguleikar ........ 15
8 Gildiskoma ........ 15
9 Námsætlanir til yrkislærugreinarnar ........ 16
Námsætlan 1: Bensin-, diesel- og el-motorar ........ 16
Námsætlan 2: Bilaumhvørvi (automiljø) ........ 17
Námsætlan 3: Bremsur ........ 18
Námsætlan 4: Eldsløkking ........ 19
Námsætlan 5: Fyrstahjálp ........ 20
Námsætlan 6: Motorstýringar ........ 21
Námsætlan 7: Ravtøkniskipanir ........ 22
Námsætlan 8: Skrokkur ........ 23
Námsætlan 9: Stýrigreiður og fjaðran ........ 24
Námsætlan 10: Transmission ........ 25
Námsætlan 11: Trygdar- og hentleikaútbúnaður ........ 26
Námsætlan 12: Epoxy ........ 27
Námsætlan 13: Dyno ........ 29
Námsætlan 14: Trygdarútgerð í persónbili ........ 30
Námsætlan 15: Klima og hitaskipanir ........ 32

# Námsskipan fyri útbúgving til bilsmið

| Námsskipan | |
|---|---|
| **Námsskipan fyri útbúgving til bilsmið**, seinast dagførd 1. august 2025. Yrkisnevndin hevur samtykt hesar útbúgvingarreglur sambært yrkisútbúgvingarlógini, felagskunngerðini og útbúgvingarkunngerð nr. 117 frá 1. juli 2025 um útbúgvingina til bilsmið. | |
| **Yrkisdepilin**<br>Hoydalsvegur 1<br>100 Tórshavn<br>Telefon: 30 65 60<br>www.yrkisdepilin.fo<br>yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo | **Skúli sum bjóðar skúlagongdina**<br><br>**Glasir**<br>Janusargøta 3<br>100 Tórshavn<br>Telefon 61 60 00<br>www.glasir.fo<br>post@glasir.fo |
| Til ber at venda sær til Yrkisdepilin og skúlarnar við spurningum um útbúgvingina og fyri at fáa meiri kunning um útbúgvingina.<br><br>Um ósamsvar er millum námsskipanina og útbúgvingarkunngerðina, so er tað altíð útbúgvingarkunngerðin, sum er galdandi! | |

# 1 Um útbúgvingina

Endamálið við útbúgvingini er ásett í kapitli 1 í útbúgvingarkunngerðini.

Útbúgvingin tekur 4 ár, og er lutað sundur í verkliga læru á góðkendum læruplássi og skúlagongd í góðkendum yrkisskúla.

# 2 Førleika- og lærumál

Førleikamálini fyri, hvat lærlingurin skal duga við lokna útbúgving eru ásett í útbúgvingarkunngerðini og endurgivin niðan fyri í 2.1. Í hesi námsskipan verða førleikamálini fyri útbúgvingina knýtt at lærugreinum í skúlunum og at verkligu lærumálunum fyri læruplássini. Verkligu lærumálini eru ásett í parti 2.2 og lærumálini fyri hvørja lærugrein sær eru ásett í parti 9.

## 2.1 Førleikamál við útbúgvingarlok

Førleikamál fyri útbúgvingina eru ásett í útbúgvingarkunngerðini, og hesi eru, at lærlingurin dugir:

1. at greiða úr hondum arbeiði við støði í galdandi reglum um trygd, arbeiðsumhvørvi og góðskuábyrgd,
2. at umvæla og viðlíkahalda sambært leiðreglum/handbókum,

3. at brúka KT og elektroniskar leitimiðlar til at finna fram viðkomandi leiðreglur/handbøkur,
4. at greiða frá eini arbeiðsuppgávu,
5. at greiða úr hondum eftirlit, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda bremsuskipan við tilhoyrandi stýriskipanum,
6. at greiða úr hondum eftirlit, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda ravmagnsskipan og tilhoyrandi lutir,
7. at greiða úr hondum eftirlit, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda róðurgreiðurnar og undirvognin við tilhoyrandi stýriskipanum,
8. at greiða úr hondum eftirlit, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda transmissiónina,
9. at greiða úr hondum eftirlit, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda mekaniska bygnaðin á bensinmotorum og dieselmotorum,
10. at greiða úr hondum eftirlit, kanna brek og viðlíkahalda bygnaðin á el og hybrid motorum,
11. at greiða úr hondum eftirlit, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda motorstýringarskipanir á bensinmotorum, dieselmotorum, el og hybrid motorum,
12. at greiða úr hondum eftirlit, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda køliskipanir og klimaskipanir t.e. kabinu, motor og battarí,
13. at greiða úr hondum eftirlit og gera persónbilar og vørubilar sýnsklárar,
14. at kanna brek og umvæla trygdarútbúnaðin og hentleikaútbúnaðin,
15. at greiða frá vitan um tøkniliga menning og nýskapan við tí fyri eyga at minka um ávirkanina á umhvørvi, t.d. menning av ravmagnsbilum, motortøkni, róðurgreiðir, brennievni, transmissión og brennikyknutøkni, og
16. at handfara sveisiamboð og skeriamboð vandaleyst.

## 2.2 Verklig lærumál

Eitt virki skal lúka ávís verklig lærumál og hava ávísa útgerð tøka fyri at fáa læruplássgóðkenning. Førleikamál fyri lærugreinar og verkligu lærumálini skulu tryggja, at lærlingur eftir lokna útbúgving lýkur ásettu førleikamálini fyri útbúgvingina.

Í talvu 1 eru verkligu lærumálini fyri bilsmiðútbúgivngina ásett. Í talvuni verður víst á, hvørji útbúgvingarførleikamál í parti 2 einstøku verkligu lærumálini styðja. Í talvu 2 er yvirlit yvir, hvørja útgerð eitt virkið má hava fyri at fáa læruplássgóðkenning til bilsmið.

*Talva 1. Verkligu lærumálini og yvirlit yvir hvørji førleikamál, ið verkliga læran styðjar.*

| Nr. | Tilvísing til førleikamál | Mál fyri verkligu læruna |
|---|---|---|
| | 1, 2, 3, 4, 5, 6, 13, 14, 15 | **Bremsur** |
| 1 | | Kanna, umvæla og royndarkoyra hydrauliskar bremsuskipanir |
| 2 | | Kanna, stilla og umvæla mekaniskar skipanir |
| 3 | | Skifta klossar og bakkar á skivum og trumlum |
| 4 | | Kanna og umvæla ABS-skipani |
| | | |
| | 1,2, 3, 4, 6, 8, 13, 15 | **Kraftyvirføring (Transmissión)** |
| 5 | | Kanna og skifta koplingar |
| 6 | | Kanna og umvæla kardan- og drívaksla |
| 7 | | Kanna og umvæla mekaniskar/hydrauliskar koblingsskipanir |
| | | |
| | 1, 2, 3, 4, 6, 9, 15, 16 | **Bensin- og dieselmotorar** |
| 8 | | Kanna og umvæla køli- og smyrjiskipanir |
| 9 | | Skifta tannreim á bensin- og dieselmotorum |
| 10 | | Skifta kamreim/ketu |
| 11 | | Kanna og umvæla dieselinnspræningarskipanir |
| 12 | | Kanna og umvæla gløðiskipanir |
| | | |
| | 1, 2, 3, 4, 5, 6, 13, 14, 15 | **Hentleikaskipanir og trygd** |
| 13 | | Viðlíkhalda og umvæla klimaskipanir |
| 14 | | Umvæla airbagskipanir |
| | | |
| | 1, 2, 3, 4, 5, 6, 7, 13, 14, 15 | **Róðurgreiðir og undirvognur** |
| 15 | | Eftirlit av róðurgreiðum og undirvogni |
| 16 | | Arbeiða við 4-hjólsútmáting |
| 17 | | Umvæla róðurgreiðir og hjólfesti við tilhoyri |
| | | |
| | 1, 2, 3, 4, 5, 6, 13, 14, 15 | **El-veiting og nýtsluskipanir** |
| 18 | | Máta og feilfinna á el-veitingarskipanum og akkumulatorum |
| 19 | | Eftirlit og umvæla lyktir sambært lógaráseting |

| | | |
|---|---|---|
| 20 | | Eftirlit og umvæla viskaraskipanir |
| 21 | | Útmáta og umvæla el-skipanir sum heild |
| 22 | | Eftirlit og umvæla motorstýringar og innspræningarskipani |
| 23 | | Eftirlit og umvæla bremsuskipanir, har ímillum ABS, ESC v.m |
| 24 | | Arbeiða við elektroniskum skipanum |
| 25 | | Eftirlit og umvæla elektroniskar gerviskipanir og differentialir |
| | | |
| | 1, 2, 3, 4, 6, 10, 11, 12, 14, 15 | **El og hybrid akfør** |
| 26 | | Hava atgongd til trygdarbløð til arbeiði við aðrari orkukeldu<br>enn bensin og diesel |
| 27 | | Gera kontrolmátingar av drívbattaríi og frákoblingar av battaríi |
| 28 | | Kanna og umvæla køliskipanir til battarí og elmotorar |
| 29 | | Kanna løðistøðu (kapasitet) av battaríði |
| | | |
| | | **Eyka** |
| 30 | | Kanna og stilla ventilar |

*Talva 2. Yvirlit yvir kravda útgerð*

| Nr. | Yvirlit yvir kravda útgerð á verkstaðnum |
|---|---|
| 1 | Hydraulik pressa, stødd 25 tons |
| 2 | Trýstluftsútbúnaður |
| 3 | CO2-gasssveisiútgerð |
| 4 | Kompressiónsmátari, bensin/diesel |
| 5 | Bonkslípimaskina |
| 6 | Avbalanseringsútgerð |
| 7 | Multimetur |
| 8 | Motortestari |
| 9 | Lyktatól |
| 10 | 4-hjólssporitól |

| | |
|---|---|
| 11 | Mikrometurskrúva |
| 12 | Skjótilæra |
| 13 | Skjótilæra til bremsuskivir/trumlu |
| 14 | Momentlyklar |
| 15 | Vacuummetur við fordeilara |
| 16 | Bremsuvætutestari |
| 17 | Battarítestari |
| 18 | Løðitól |
| 19 | Útgerð til at gera bremsurør |
| 20 | Refraktormetur (vektfyllumátari) |
| 21 | Útgerð til trykkroynd av køliskipanini |
| 22 | Oljutrýstmanometur |
| 23 | Dekkmaskina |
| 24 | Bremsuvaskari |
| 25 | Bremsurullufelt |
| 26 | Diagnosutestari |
| 27 | Atgongd til teknisk data, autodata/toleranse v.m. |

Fyri at røkka førleikamálunum fyri útbúgvingina, skal læruplássið leggja verkligu læruna soleiðis til rættis, at lærlingurin fær høvi til at arbeiða við uppgávunum, sum nevndar eru í talvu 1. Læruplássið váttar við starvsváttan eftir lokna lærutíð, at lærlingur hevur arbeitt við nevndu økjum/uppgávum.

# 3 Útbúgvingartíð, bygnaður og innihald

Útbúgvingartíðin er 4 ár. Skúlagongdin í útbúgvingini er 55 vikur, íroknað eitt sveinaroyndarskeið. Skúlagongdin er lutað í 5 skúlaskeið og eitt sveinaroyndarskeið og verður skipað samsvarandi talvu 3.

*Talva 3. Skipan av skúlagongd og longd á skúlaskeiðum*

| Skúlaskeið | Vikur | Undirvísingartímar |
|---|---|---|
| 1. skúlaskeið | 20 | 720 |
| 2. skúlaskeið | 10 | 360 |
| 3. skúlaskeið | 10 | 360 |
| 4. skúlaskeið | 5 | 180 |
| 5. skúlaskeið | 5 | 180 |
| Sveinaroyndarskeið | 5 | 180 |
| **Tilsamans** | **55** | **1980** |

Felagskunngerðin (nr. 83 frá 2013) ásetur sambært § 6, stk. 1, pkt. 2, at skemalagda undirvísingarvirksemið í mesta lagi fevnir um 36 undirvísingartímar um vikuna, tvs. at eitt skúlaskeið á 20, 10 og 5 vikur í mesta lagi hevur ávikavist 720, 360 og 180 undirvísingartímar.

Skúlagongdin í útbúgvingini fevnir um almennar lærugreinar sbrt. § 4 í útbúgvingarkunngerðini, vallærugreinar og yrkislærugreinar sbrt. §§ 5 og 6 í útbúgvingarkunngerðini. Skúlaundirvísingin skal í byrjanini geva eina breiða heildarfatan og seinni miðar undirvísingin ímóti at veita lærlingum neyðugan førleika í ávísum yrki sbrt. § 11, stk. 2 í yrkisútbúgvingarlógini).

Lærugreinar verða allýstar við einum lærugreinastig, sí nærri í 3.1 – 3.3, og nærri lýstar við innihaldi og førleikamálum í námsætlanum í parti 9.

Í útbúgvingarkunngerðini er ásett undirvísingartímatøl fyri almennar lærugreinar hvør sær og samlaða talið av undirvísingartímum fyri yrkislærugreinar. Skemlagda undirvísingartímatalið fyri almennar lærugreinir eru sambært § 4, stk. 2 í útbúgvingarkunngerðini 360 undirvísingartímar, har hvør lærugrein á E stigi hevur 72 undirvísingartímar. Um lærlingur velur lærugrein á C stigi verða tillagingar gjørdar. Skemalagda tímatalið til yrkislærugreinar er til samans 1286 undirvísingartímar sambært § 5, stk. 1. Harumframt eru ásettar 80 undirvísingartímar til yrkisvallærugreinar sbrt. § 6.

Klokkutímatal verður umroknað til undirvísingartímatal, klokkutímar x 1 1/3 = undirvísingartímar, sí yvirlit fyri undirvísingartímatøl í talvu 4.

Eftirmeting verður skipað eftir hvørt skúlaskeið. Eftirmeting kann verða við luttøku (L), støðumeti (S) og próvtøku (P), sí nærri í partinum um eftirmeting. Í útbúgvingarkunngerðini er ásett, at 74 undirvísingartímar eru settar av til hesa eftirmeting.

Í talvu 4 er yvirlit yvir lærugreinar og býtið av tímatølum. Býtið av lærugreinum millum skúlaskeiðini verður lagt soleiðis til rættis, at undirvísingin í mest møguligan mun styðjar verkliga partin av útbúgvingini. Í talvuni er eisini yvirlit yvir lærugreinastig og tilvísing er til nr. á námsætlan fyri hvørja lærugrein sær. Í talvuni síggjast eisini hvørji útbúgvingarførleikamál í parti 2.1, ið lærugreinarnar styðja. Talmerkingin av førleikamálunum vísir til talmerkingina í parti 2.1.

*Talva 4. Yvirlit og skipan av lærugreinum í útbúgvingini.*

| Førleikamál | Lærugrein | Lærugreinastig | Undirvísingartímar | Eftirmeting[1] |
|---|---|---|---|---|
| | Almennar lærugreinar | | | |
| | Alisfrøði | E | 72 | S/P |
| | Enskt | E | 72 | S/P |
| | Føroyskt | E | 72 | S/P |
| | Støddfrøði | E | 72 | S/P |
| | Vallærugrein | E | 72 | S/P |
| **Í alt** | | | **360** | |
| | Yrkislærugreinar | | | |
| 1, 2, 3, 9, 10, 11 | Bensin-, diesel- og elmotorar (1) | Framkomið stig | 328 | S/P |
| 1, 2, 15 | Bilaumhvørvi (2) | Byrjanarstig | 48 | S/P |
| 2, 4, 5, 13 | Bremsur (3) | Framkomið stig | 122 | S/P |
| 1 | Eldsløkking (4) | Byrjanarstig | 4 | L |
| 1 | Fyrstahjálp (5) | Byrjanarstig | 12 | L |
| 1, 2, 3, 4, 10, 11 | Motorstýringar (6) | Framkomið stig | 176 | S/P |
| 1, 2, 3, 4, 6 | Ravtøkniskipanir (7) | Framkomið stig | 327 | S/P |
| 1, 2, 4, 16 | Skrokkur (8) | Byrjanarstig | 20 | S |
| 1, 2, 3, 4, 7 | Stýrigreiðir og fjaðran (9) | Framkomið stig | 108 | S/P |
| 1, 2, 3, 4, 8 | Transmissión (10) | Vanastig | 80 | S/P |
| 1, 2, 3, 4, 12, 14 | Trygdar- og hentleikaútbúnaður (11) | Byrjanarstig | 61 | S/P |
| **Í alt** | | | **1286** | |
| | | | | |
| | **Vallærugreinar** | | **80** | |
| 1 | Epoxy (við rútum) (12) | Byrjanarstig | 16 | L |
| 1, 2, 3, 4, 10, 11 | Dyno (13) | Byrjanarstig | 16 | S/P |
| 1, 2, 3, 4, 14 | Trygdarútgerð í persónbili (14) | Vanastig | 16 | S/P |
| 1, 2, 3, 4, 12, 14 | Klima og hitaskipanir (15) | Framkomið stig | 32 | S/P |
| | **Eftirmeting** | | **74** | |
| | | | | |
| | **Sveinaroynd** | | **180** | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Samanlagt** | | | **1980** | |

[1] S: støðumet, L: luttøka, P: próvtøka

## 3.1 Nærri um almennar lærugreinar

Almennu lærugreinarnar fevna um ástøðiliga undirvísing, ið skal miða ímóti at menna tann almenna kunnleikan hjá lærlinginum og styðja undirvísingina í yrkislærugreinunum. Somuleiðis skulu almennu lærugreinarnar styrkja persónliga menning, lestrarførleika og samfelagsfatan. Almennar lærugreinar eru ásettar at vera á stig E.

Bilsmiðútbúgvingin hevur hesar almennar lærugreinar:

- **Lærugreinin alisfrøði E** skal geva lærlinginum vitan og innlit í alisfrøðilig fyribrigdi, hugtøk og arbeiðshættir, sum hava týdning fyri arbeiði innan yrkið. (Sí Alisfrøði E - namsaetlanir.fo)
- **Lærugreinin enskt E** skal menna førleikarnar hjá lærlinginum at samskifta á enskum máli um tær fakligu uppgávurnar, sum arbeitt verður við. Við hesum mennist orðavalið hjá lærlinginum, og lærlingurin fær betri førleikar at samskifta. (Sí Enskt E - namsaetlanir.fo)
- **Lærugreinin føroyskt E** skal menna førleikarnar hjá lærlinginum at samskifta á føroyskum máli um tær fakligu uppgávurnar, sum arbeitt verður við. Við hesum mennist orðavalið hjá lærlinginum, og lærlingurin fær betri førleikar at samskifta. (Sí Føroyskt - namsaetlanir.fo)
- **Lærugreinin støddfrøði E** er grundleggjandi fortreyt í øllum teimum uppgávum, sum lærlingurin arbeiðir við. Serliga eru tað teir grundleggjandi førleikarnir, sum verða nýttir – flatamál/vídd, mongd, prísir, handilsrokning, brot, geometri, umframt meira framkomnir roknihættir so sum trigonometri. (Sí Støddfrøði E - namsaetlanir.fo)
- **Vallærugrein á E-stigi**. Bilsmiðútbúgvingin hevur eina almenna vallærugrein, sum skúlin bjóðar út. (Sí Yrkisnám - namsaetlanir.fo)

## 3.2 Nærri um vallærugreinar

Vallærugreinarnar skulu miða eftir at nøkta áhugamál lærlingsins, at stuðla áhugan fyri framhaldandi útbúgving og at menna yrkis- og lestrarførleikan. Vallærugreinarnar skulu eisini stimbra vanligu førleikakrøvini og arbeiðsmøguleikarnar í samfelagnum.

## 3.3 Nærri um yrkislærugreinar

Námsætlanirnar fyri einstøku yrkislærugreinarnar síggjast í fylgiskjølunum.

Yrkislærugreinarnar sermerkja læruna til bilsmið og skulu veita almennan kunnleika og fakligan yrkisførleika. Partar av yrkislærugreinunum eru serlærugreinar, ið eru á hægsta fakliga stigi innan

yrkið, og fata tær um verkliga og ástøðiliga undirvísing, sum skal miða ímóti at veita lærlinginum serligan yrkisførleika sum bilsmiður.

Førleikamátini fyri yrkislærugreinarnar eru í trimum stigum, so til ber er at gera ein karm um lýsing, skjalprógvan og sýning av stigunum og framgongdini í undirvísingini í mun til uppgávurnar. Arbeitt verður á trimum stigum, ið vísa til torleikastigini í námsætlanunum: byrjanarstig, vanastig og framkomið stig:

### Byrjanarstig

Lærlingurin dugir at loysa eina uppgávu og arbeiða í vandum førum ella út frá einum kendum greiðsluevni, ella hann dugir at gera torførari arbeiði við vegleiðing. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til at seta seg inn í grundleggjandi kunnleika- og hegnisøki í útbúgvingini, og førleikar til at menna ábyrgd og grundarlag til framhaldandi læring. Á byrjanarstigi skal sjálvstøði somuleiðis verða grundfest í samband við, at uppgávur verða loystar.

### Vanastig

Lærlingurin dugir at leggja til rættis og loysa eina uppgávu við vandum ella kendum greiðsluevnum og umhvørvi, sjálvstøðugt og í samstarvi við onnur. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til sjálvstøðugt at seta seg inn í torskildari greiðsluevni og at samskifta við onnur um loysnirnar. Afturat hesum verður dentur lagdur á smidleika og tillagingarevni.

### Framkomið stig

Lærlingurin dugir at meta um ein trupulleika, leggja til rættis, loysa og fremja eina uppgávu ella at loysa ein trupulleika, eisini í óvandum førum, einsamallur ella í samstarvi við onnur, við atliti at uppgávuni. Á hesum stigi verður dentur lagdur á persónligar førleikar til sjálvstøðugt at taka ábyrgd og at sýna virkisanda til sjálvur at orða og loysa fakligar og sosialar uppgávur og trupulleikar. Afturat hesum verður dentur lagdur á tilvitan um góðsku og skapanarevni.

# 4 Eftirmeting av skúlaskeiðum

Eftirmeting verður skipað eftir hvørt skúlaskeið. Eftirmeting kann verða við luttøku (L), støðumeti (S) og próvtøku (P). Luttøkuváttan kann bert latast fyri lærugreinar við minni enn 30 undirvísingartímum. Í námsætlanini fyri hvørja lærugrein í parti 9 er ásett, hvat fyri eftirmeting verður brúkt fyri hvørja lærugrein sær.

### Skúlaskeið 1

Eftirmetingin er býtt í tveir partar. Ein ástøðiligur partur og ein verkligur partur.

#### Eftirmetingarháttur:

- Ástøðiligi parturin fevnir um eina skrivliga roynd á 2 klokkutímar. Royndin er við loyvdum hjálparmiðlum, ið eru fylgiskjøl og lummaroknari, sum skúlin hevur góðkent.

- Verkligi parturin fevnir um eina verkliga uppgávu á 8 undirvísingartímar.

### Døming:

- Ein lærari og ein uttanhýsis metingardómari (tilnevndur av Yrkisdeplinum) døma skrivligu royndina og verkligu uppgávuna.
- Eitt próvtal verður latið fyri ástøðiliga partin.
- Eitt próvtal verður latið fyri verkliga partin.
- Fyri at standa skúlaskeiðið skal lærlingur í minsta lagi hava fingið próvtalið 02 fyri ástøðiliga partin og 02 fyri verkliga partin.

## Skúlaskeið 2-5

Eftirmetingarnar av skúlaskeiðunum 2-5 verða skipaðar eftir sama leisti sum fyri 1. skúlaskeið. Eftirmetingarnar eru býttar í tveir partar. Ein ástøðiligan part og ein verkligan part.

### Eftirmetingarháttur:

- Ástøðiligi parturin verður eftirmettur við einari skrivligari roynd á 2 klokkutímar. Royndin er við loyvdum hjálparmiðlum, ið eru fylgiskjøl og lummaroknari, sum skúlin hevur góðkent.
- Verkligi parturin verður eftirmettur við leypandi verkligum uppgávum, innlatingum og endar við støðumeti staðið/ikki staðið. Staðið merkir í minsta lagi 02.

### Døming:

- Minst tveir lærarar døma skrivligu royndina.
- Eitt próvtal verður latið fyri ástøðiligu royndina.
- Fyri at standa skúlaskeiðið skal lærlingur í minsta lagi hava fingið próvtalið 02 fyri skrivligu royndina og hava staðið verkliga partin.

# 5 Sveinaroynd

Sveinaroyndin er partur av sveinaroyndarskeiðnum, ið skúlin skipar fyri, og sum varir 5 vikur. Fyri at innskriva seg til sveinaroyndarskeiðið skal lærlingurin hava staðið 1. – 5. skúlaskeið, og hava góðkendan lærusáttmála sbrt. § 16, stk. 1 í kunngerð um felags reglur fyri yrkisútbúgvingar.

Fyri yrkisútbúgving til bilsmið skal lærlingurin sbrt. §10, stk. 2 í útbúgvingarkunngerðini hava koyrikort til persónbil undir 3.500 kg. (bólkur B), áðrenn lærlingurin byrjar uppá sveinaroyndina. Yrkisnevndin kann í serligum føri víkja frá kravinum um koyrikort. Mælt verður til, at lærlingurin byrjar koyrifrálæruna, beint eftir at royndartíðin er úti, og lærlingurin er fyltur 18 ár.

Umframt sjálvu sveinaroyndina, fevnir sveinaroyndarskeiðið eisini um fyrireiking til sveinaroyndina, ið skúlin skipar fyri. Skúlin leggur til rættis tíðarætlan fyri sveinaroyndarskeiðið, ið lærlingurin fær útflýggjaða, tá ið hann verður boðsendur at møta.

Kunngerð um próvtøkur í yrkislærugreinum og fremjingarreglur fyri yrkis- og sveinaroyndir ásetur reglur um uppgávur, tilnevning av metingardómarum, ábyrgdarfólk og ansara.

Skemaløgd undirvísing á 137 undirvísingartímar er partur av sveinaroyndartíðarskeiðinum. Sveinaroyndin fevnir um tveir høvuðspartar: ein ástøðiligan part og ein verkligan part.

## 5.1 Ástøðiligi parturin av sveinaroyndini

**Próvtøkuháttur:**

- Ástøðiligi parturin av sveinaroyndini er ein skrivlig roynd á 3 klokkutímar.
- Royndin er við loyvdum hjálparmiðlum, ið eru fylgiskjøl og lummaroknari, sum skúlin hevur góðkent.

**Døming:**

- Ein lærari og tveir metingardómarar døma skrivligu royndina.
- Eitt próvtal verður latið fyri skrivligu royndina.
- Fyri at standa ástøðiliga partin av sveinaroyndini skal lærlingurin í minsta lagi hava fingið próvtali 02 fyri skrivligu royndina.

## 5.2 Verkligi parturin av sveinaroyndini

**Próvtøkuháttur:**

- Fortreytin fyri at fara undir verkligu royndina er, at lærlingur hevur staðið skrivligu/ástøðiligu royndina.
- Verkligi parturin av sveinaroyndini fevnir um tvær verkligar uppgávur.
- Lærlingurin fær 16 undirvísingartímar til verkligu royndina.
- Eftirmetingin av verkligu uppgávunum er settur saman av einum verkligum og einum munnligum parti. Metingin verður gjørd leypandi av avrikinum og av arbeiðsgongdini, við at spurt verður um arbeiðsgongdina og við samskifti ímillum metingardómarar og lærling, í tíðini lærlingurin ger verkliga partin av sveinaroyndini.

**Døming:**

- Ein lærari og tveir metingardómarar døma verkligu royndina.

- Givið verður eitt próvtal fyri verkætlanina.
- Fyri at standa verkliga partin av sveinaroyndini skal lærlingurin í minsta lagi hava fingið próvtalið 02 fyri verkligu royndina.

## 5.3 Endaligt sveinaroyndarpróvtal

Ástøðiligi og verkligi parturin av sveinaroyndini skal standast hvør sær, fyri at sveinaroyndin er staðin.

Endaliga sveinaroyndarpróvtalið verður roknað sum eitt vektað miðaltal við einum desimali av próvtalinum fyri ástøðiliga partin og próvtalinum fyri verkliga partin av sveinaroyndini. Próvtalið fyri ástøðiliga partin skal vektast við ¼ og próvtalið fyri verkliga partin við ¾.

*Talva 5: Í sveinaroyndini verður lærlingurin mettur sambært niðanfyristandandi próvtalsstiga:*

| Próvtal | Merking | Lýsing |
|---|---|---|
| 12 | Fyri framúr gott avrik | Próvtalið 12 verður givið fyri avrik, sum lýtaleyst ella mest sum lýtaleyst lýkur málini. |
| 10 | Fyri sera gott avrik | Próvtalið 10 verður givið fyri sera gott avrik, ið við onkrum smávegis lýtum lýkur flestu málini. |
| 7 | Fyri gott avrik | Próvtalið 7 verður givið fyri gott avrik, ið við nøkrum lýtum, væl lýkur málini. |
| 4 | Fyri hampiligt avrik | Próvtalið 4 verður givið fyri hampiligt avrik, ið hevur fleiri grov lýti og ikki lýkur málini væl. |
| 02 | Fyri toluligt avrik, sum kann verða góðtikið | Próvtalið 02 verður givið fyri toluligt avrik, ið akkurát stendur mát, og í minsta mun lýkur málini. |
| 00 | Fyri ikki nøktandi avrik | Próvtalið 00 verður givið fyri ikki nøktandi avrik, ið ikki stendur mát og ikki lýkur málini. |
| -3 | Fyri heilt vánaligt avrik | Próvtalið -3 verður givið fyri heilt vánaligt avrik, sum als ikki kann verða góðtikið. |

Tá ið liðugt er at próvdøma sveinaroyndina, skal oyðublað hjá Yrkisdeplinum við endaligu próvtølunum fyri hvønn lærling sær sendast til Yrkisdepilin.

Eftir at, Yrkisdepilin hevur móttikið váttan frá skúlanum og starvsváttan frá læruplássinum, verður sveinabræv útskrivað og latið læruplássi til at handa lærlingi.

# 6 Endurpróvtøkur og sjúkrapróvtøka

Um lærlingurin gerst sjúkur áðrenn, ella meðan sveinaroyndin er, og ikki er førur fyri at greiða úr hondum sveinaroyndina, áseta skúlin og yrkisnevndin eina sjúkrapróvtøku skjótast gjørligt, eftir at lærlingurin er vorðin frískur. Um sjúka bert ávirkar annan partin av sveinaroyndini, verður

endurpróvtøka bert skipað fyri partin, sum lærlingur ikki fekk luttikið í vegna sjúku, t.d. um lærlingur hevur staðið ástøðiligu royndina, verður endurpróvtøka bert skipað fyri verkliga partin av sveinaroyndini.

Um lærlingur ikki stendur sveinaroyndina, skulu metingardómararnir beinanvegin boða skúlanum og yrkisnevndini frá hesum, og geva eina stutta skrivliga frágreiðing um orsøkina til, at lærlingurin ikki stóð royndina. Metingarskjøl, sum eru útfylt á nøktandi hátt, kunnu sanna frágreiðingina.

Skúlin skal hareftir skjótast gjørligt seta seg í samband við lærlingin og læruplássið fyri at fáa greiðu á, hví lærlingurin ikki stóð royndina og fyri at greiða frá, hvørjar møguleikar lærlingurin og læruplássið hava, og fyri at finna út av, hvat skal gerast víðari. Um lærlingurin og læruplássið eru samd um, at lærlingurin skal fara til nýggja sveinaroynd, og lærusáttmálin gongur út, áðrenn lærlingurin hevur staðið sveinaroyndina, skal lærusáttmálin leingjast, soleiðis at hann er galdandi alla sveinaroyndina. Leinging av lærusáttmála verður gjørd á oyðublaðið, ið er gjørt til hetta endamál. Umsókn um leinging av lærusáttmála verður send Yrkisdeplinum.

Um lærlingurin gerst sjúkur undir eftirmetingini av skúlaskeiðunum, gera skúlin og læruplássið avtalu um, hvussu skal farast fram og nær nýggj roynd skal vera.

# 7 Kærumøguleikar

Í felagskunngerðini fyri yrkisútbúgvingar eru ásetingar um kærur av fyrisitingarligari avgerð í § 37, um próvtøku í almennum lærugreinum í §§ 37-41, og um yrkis- og sveinaroynd í § 42.

# 8 Gildiskoma

Námsskipanin er galdandi fyri lærlingar, sum byrja 1. ella 2. skúlaskeið eftir 1. august 2025.

# 9 Námsætlanir til yrkislærugreinarnar

## Námsætlan 1: Bensin-, diesel- og el-motorar

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Framkomið stig
**Vegleiðandi** tímatal: 328

### Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin lærir at greiða úr hondum eftirlit, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda mekaniska bygnaðin á bensin- og dieselmotorum.

### Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- at gera eitt vanligt eftirlit á motorum,
- at kanna og umvæla køliskipanina og máta el-periferi,
- at taka bensin- og dieselmotorar heilt sundur og seta teir saman aftur.

### Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2, 3, 9, 10 og 11.

### Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumet/próvtøku.

# Námsætlan 2: Bilaumhvørvi (automiljø)

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal:** 48

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin fær vitan um og lærir at greiða úr hondum arbeiði við støði í galdandi reglum um trygd, arbeiðsumhvørvi og góðskuábyrgd. Lærlingurin skal kunna skilja og arbeiða út frá kunngerð um "Detail Forskrifter for Køretøjer", og skilja samanspælið millum samfelag og umhvørvið.

Lærlingurin skal kunna fyrihalda seg til galdandi lóg um ítøkiliga bilfakligar arbeiðsuppgávur.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- at greiða frá vitan um tøkniliga menning og nýskapan við tí fyri eyga at minka um ávirkanina á umhvørvi, t.d. menning av ravmagnsbilum, motortøkni, róðurgreiðir, brennievni, transmissión og brennikyknutøkni.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2 og 15.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumet/próvtøku.

# Námsætlan 3: Bremsur

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Framkomið stig
**Vegleiðandi** tímatal: 122

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin dugir at greiða úr hondum eftirlit, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda bremsuskipan við tilhoyrandi stýriskipanum.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- Gera trygdareftirlit á bremsuskipan í samsvari við galdandi ásetingar og lógarkrøv, og gera vanligt eftirlit, umvæling og stilla hydrauliskar bremsur og parkeringsbremsur.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2, 4, 5 og 13.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumet/próvtøku.

# Námsætlan 4: Eldsløkking

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 4

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin fær í kunnleika um at fyribyrgja, at eldur festur í, og hvussu ein skal bera seg at um eldur er í. Eisini dugir við einføldum hjálparamboðum og –hættum at sløkkja smærri eldar og forða eldi í at breiða seg.

Lærlingurin fær prógv í eldsløkking á byrjanarstigi (grundskeið).

Undirvíst verður í eldsløkking samsvarandi leiðreglum hjá “Dansk Brand- og sikringsteknisk Institut” (DBI). Undirvísari skal hava fullgilt “instruktørprógv” fyri at undirvísa í eldsløkking.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- At lærlingurin hevur kunleika um eldástøði og grundleggjandi sløkkiástøði.
- At lærlingurin dugir at fyribyrgja eldáseting.
- At lærlingurin dugir at sløkkja smærri eldar.
- At lærlingurin dugir ávaringarmannagongdir.
- At lærlingurin hevur kunnleika um serligar eld- og spreingivágar.
- At lærlingurin hevur kunnleika um m.a. brandteppi, pulvur-, CO2-, vatn- og skúmsløkking.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1.

## Próvtøka / eftirmeting

Krav er um virkna luttøku.

Luttøkuváttan. Skeiðsváttan verður latið fyri luttøku.

# Námsætlan 5: Fyrstahjálp

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 12

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin er førur fyri at halda lív í ella fáa lív aftur í persón eftir vanlukku ella brádligari sjúku til bjargingarfólk ella lækni kemur á staðið.

Undirvíst verður í fyrstuhjálp samsvarandi leiðreglum hjá Dansk Rødekors – Dansk Førstehjælpsråd (DFR). Undirvísari skal hava fullgilt "instruktørprógv" fyri at kunna undirvísa í fyrstuhjálp.

## Førleikamál fyri lærugreinina

- Duga teir 4 høvuðshættirnar í fyrstuhjálp.
- Duga fyrstuhjálp tá talan eru hjartasteðg við og uttan hjartastartara.
- Duga fyrstuhjálp til bløðandi persón.
- Duga fyrstuhjálp til persón fremmandalikam í andaleiðini.
- Duga at flyta ella lyfta persón við skaða.
- Vísa kunnleika til sálarliga fyrstuhjálp.
- Vísa kunnleika um m.a. blóðrenslið og andaleiðina.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1.

## Próvtøka / eftirmeting

Próvtøkan fer fram samsvarandi reglugerð hjá Dansk Rødekors – Dansk Førstehjælpsråd.
Luttøkuváttan verður latið við skeiðslok.

.

# Námsætlan 6: Motorstýringar

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Framkomið stig
**Vegleiðandi tímatal**: 176

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin greiðir úr hondum eftirlit, kannar brek, umvælir og viðlíkaheldur motorstýringsskipanir á bensin, diesel og el-motorum.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- at gera eftirlit og leggja til rættis eina skynsama arbeiðsgongd í bensin- og dieselmotorum, ið hava torgreiddar tendringar- og bensininnspræningarskipanir og elektronisk stýrdar skipanir í bensin/dieselmotorum, eisini elektroniskt stýrdar brennievnispumpur.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2, 3, 4, 10 og 11.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumeti/próvtøku.

# Námsætlan 7: Ravtøkniskipanir

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Framkomið stig
**Vegleiðandi tímatal**: 327

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin greiðir úr hondum eftirlit, kannar brek, umvælir og viðlíkahalda ravmagnsskipan og startara, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda ljós- og viskaraskipanina.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- at eftirhyggja, finna brek, stilla og umvæla lyktir og tekngevingartól, viskara- og vaskiskipan.
- at finna brek í el-hjálpar- og stýrisskipanum í motorum og eftirhyggja løðingar- og startaraútbúnað.
- at miðvíst finna brek á fráskildraðum og ikki so fløktum tendrings- og innspræningsskipanum.
- at miðvíst finna brek í el-stýrdum skipanum.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2, 3, 4 og 6.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumeti/próvtøku.

# Námsætlan 8: Skrokkur

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 20

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin sveisar og sker einfaldar lutir á akførum.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- at handfara sveisi- og skeriamboð vandaleyst.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2, 4 og 16.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumeti.

# Námsætlan 9: Stýrigreiður og fjaðran

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Framkomið stig
**Vegleiðandi tímatal**: 108

## Lýsing av lærugreinini:

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin verður førur fyriat greiða úr hondum eftirlit, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda róðurgreiðurr og undirvogn við tilhoyrandi stýriskipanum.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- at vísa skil fyri uppbygnaðin av róðurgreiðum og undirvogni.
- at gera eitt fullfíggjað eftirlit, finna brek, umvæla og stilla róðurgreiðir.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamálum sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2, 3, 4 og 7.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumet/próvtøku.

# Námsætlan 10: Transmission

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Vanastig
**Vegleiðandi tímatal**: 80

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin verður førur fyri at greiða úr hondum eftirlit, kanna brek, umvæla og viðlíkahalda transmissiónina.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- at vísa skil fyri uppbygnaðin av útvekslingum og gearkassum
- duga at gera eitt fullfíggjað eftirlit, finna brek, og umvælingar innan gearing og transmissón.

## Lærugreinin stýðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2, 3, 4 og 8.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumet/próvtøku.

# Námsætlan 11: Trygdar- og hentleikaútbúnaður

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 61

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin kannar brek og umvælur trygdar- og hentleikaútbúnaðin, og at ger eftirlit, kannar brek, umvælur og viðlíkaheldur køli- og klimaskipanina.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- at gera eitt eftirlit av lutunum í eini trygdar- og hentleikaskipan.
- at gera eina heildarkanning av inn og útdata.
- at gera eftirlit, brekkanningar, stillingar og umvælingar á hita- og klima- og luftnýggaraskipanum.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2, 3, 4, 12 og 14.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumet/próvtøku.

# Námsætlan 12: Epoxy

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 16

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin arbeiðir við epoxy og isocyantaum á ein heilsuligan og tryggan hátt í mun til lærlingin sjálvan og umhvørvið sambært galdandi kunngerð frá Arbeiðseftilitinum. Skift verður í undirvísingini millum ástøði og verkliga undirvísing.

Undirvíst verður í persónligari trygd í arbeiðnum við epoxy og isocyanatum sambært vegleiðing frá Arbeiðseftirlitinum V-E012-1.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin:

- hava kunnleika um heilsuvága við arbeiðnum við tilfari sum inniheldur epoxy og isocyantir.
- kenna til substitutión skylduna og møgulig forboð fyri nýtslu.
- kenna til merking sbrt. CLP og MAL-kotur.
- duga at brúka rætta persónliga verndarútgerð.
- duga at tryggja, at onnur enn tey, sum arbeiða við evnunum og tilfarinum ikki eru so nær, at tey koma í vanda fyri at verða heilsuliga ávirkaði.
- kenna til fyriskipanir viðvíkjandi reinføri og vælferðarskipanir.
- kenna til óhapp- og skaðaviðgerð og verða førur fyri at geva fyrstuhjálp í sambandi við epoxy og isocyanatir og brúka neyðbrúsu og eygnaskol.
- kenna til handfaring av vandamiklum burturkasti.
- duga at tryggja, at ávaringartalvur eru uppsettar, tá ið arbeitt verður við epoxy og isocyanatum.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1.

## Próvtøka / eftirmeting

Aftaná undirvísingina fær lærlingurin, um hann hevur verði aktivt luttakandi allar í undirvísingini, prógv í persónligari trygd við arbeiði við epoxy og isocyanatum.

Luttøkuváttan verður latin við skeiðslok.

# Námsætlan 13: Dyno

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Byrjanarstig
**Vegleiðandi tímatal**: 16

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin fær undirvísing í arbeiði í samsvar við trygdar- og umhvørviskrøv, ið verða sett í samband við galdandi øki. Eisini verður undirvíst í at nýta umvælingarhandbøkur á norðurlendskum ella øðrum fremmandum máli og aðrar atkomuligar upplýsingar

t.d. myndugleikafyriskipanir fyri motorakfør, við tí í virkinum kravda minsta útbúnaði, somuleiðis gera brúk av viðkomandi upplýsningum og elektróniskum kunningarskipanum.

Arbeiðið skal verða gjørt í samsvari við galdandi ferðslulóg, trygdarreglur og umhvørviskrøv, soleiðis at trygd og upprunaútsjónd verða varðveitt, somuleiðis sum tað, ið kundin ynskir viðvíkjandi rakstrarkostnaði, útsjónd á akfarinum og brúksvirði.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- at greiða frá motororku (kW), snúningsmomenti (mD) og brennievnisnýtlsu (G/kW/h),
- at brúka teir ymisku møguleikarnar á einum dynometri til ítøkiligar mátingar á einum persónbili,
- at velja og gera brúk av røttum mátihátti og hjálpitólum í samsvar við galdandi trygdarreglur,
- at rokna út og meta um mátiúrslitini og samanbera tey við forskriftirnar frá framleiðaranum og útfrá hesum kunna vegleiða kundan,
- at arbeiða í samsvar við trygdar- og umhvørvis krøvini, ið verða sett í samband við galdandi økið.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2, 3, 4, 10 og 11.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumet (staðið/ikki staðið).

# Námsætlan 14: Trygdarútgerð í persónbili

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Vanastig
**Vegleiðandi tímatal**: 16

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin skal kunna gera eitt eftirlit av lutunum í eini skipan, gera eina heildarkanning av inn- og útdata við at nýta umvælingarhandbøkur á norðurlendskum ella øðrum fremmandum máli og nýta aðrar atkomuligar upplýsingar og nýtiligari máti- og kanningarútgerð.

Lærlingurin skal sýna sjálvstøði, røkjuskap og ábyrgd í loysnum av uppgávum í sambandi við at finna brek og at umvæla. Lærlingurin skal somuleiðis nýta umvælingarhandbøkur á norðurlendskum ella øðrum fremmandum máli og aðrar atkomuligar upplýsingar t.d. myndugleikafyriskipanir fyri motorakfør, við tí í virkinum kravda minsta útbúnaði, somuleiðis gera brúk av viðkomandi upplýsingum og elektróniskum kunningarskipanum.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- at greiða frá retardatiónini undir ymiskum viðurskiftum og skyna á eini skipan við breki og eini skipan ið virkar til fulnar.
- at greiða frá váganum við eini skipan, ið ikki virkar til fulnar.
- við trygdaratliti gera eina kanning og umvæling av teimum elektrónisku, pyroteknisku og mekanisku lutunum í eini trygdarskipan.
- at greiða frá teimum pyroteknisku kreftinum, ið eru í eini stoytkodda- og selaskipan, soleiðis at hann kann taka trygdar- og umhvørvisatlit í samband við arbeiði í skipanunum.
- at arbeiða við mátitóli, oscilloskop og diagnosutestara á skipanunum.
- at útlesa møgulig brek á egindiagnosuni á eini skipan.
- at gera eftirlit, skipaða brekkanning og tilrættalegga umvælingar- og viðlíkahaldsarbeiði í samsvar við galdandi umhvørvis- og trygdarkrøv.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2, 3, 4 og 14.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumet/próvtøku.

# Námsætlan 15: Klima og hitaskipanir

**Lærugreinabólkur**: Yrkislærugrein
**Torleikastig**: Vanastig
**Vegleiðandi tímatal**: 32

## Lýsing av lærugreinini

Endamálið við undirvísingini er, at lærlingurin ger eftirlit, brekkanningar, stillingar og umvælingar á hita- og klima- og luftnýggaraskipanum.

Lærlingurin skal sýna sjálvstøði, røkjuskap og ábyrgd í loysnum av uppgávum í sambandi við at finna brek og at umvæla. Lærlingurin skal somuleiðis nýta umvælingarhandbøkur á norðurlendskum ella øðrum fremmandum máli og aðrar atkomuligar upplýsingar, t.d. myndugleikafyriskipanir fyri motorakfør, við tí í virkinum kravda minsta útbúnaði,s omuleiðis gera brúk av viðkomandi upplýsningum og elektróniskum kunningarskipanum.

## Førleikamál fyri lærugreinina

Við undirvísingarlok skal lærlingurin duga:

- at skifta einkultar lutir, elektriskar eins og mekaniskar á eini virkandi skipan sambært forskriftunum,
- at gera eina tættleikaroynd, tøma og fylla eina skipan, áfylla røttu nøgd av olju og somuleiðis lekakanna skipanina.
- at endurvinna kølievni, avmontera og goyma lutir á rættan hátt, reingera fordampara, kondensator, slangur og aðrar lutir, herundir kanna slangur fyri slit, skipanina fyri mekanisk brek og elektriskar bindingar fyri tæring og rætta brek.
- at seta eina skipan ígongd og innkoyra skipanina, herundir brúka egnaði mátitól í samband við arbeiðið.
- at greiða frá oljusløgum, pakning- og slangutilfar í samband við skift til R-134a somuleikis hava kunnleika til trygdar- og umhvørviskrøv, ið eru til arbeiðið á økinum, umvæla ella útskifta lutir í samsvar við fyriskipanir, lógarkrøv og kundaynskir og kunna avhenda eina skipan rakstrar- og kundaklára.
- tá ið brek eru staðfest, at leggja til rættis og fremja eina skynsama arbeiðsgongd og somuleiðis staðfesta vavið á umvælingini.
- at vegleiða kundan út frá løgligum, tøkniligum og kostnaðarligum metingum.

## Lærugreinin styðjar fylgjandi førleikamál sambært útbúgvingarkunngerðini

Førleikamál nr. 1, 2, 3, 4, 12 og 14.

## Próvtøka / eftirmeting

Verður gjørd við støðumet/próvtøku.